# Hjálpir fyritøkum at gagnnýta upplýsingar til



– Tá ið hendan verkætlanin er liðug, er ætlanin at fara víðari, tí hetta er ikki ein skipan, sum bara kann brúkast í peningastovnum. Tvørturímóti kunnu flest allar fyritøkur og stovnar fáa gagn av henni, sigur Fróði Hansen á Elektron

**Íslendska KT- fyritøkan, Skyrr, er farin í samstarv við Elektron um eina nýggja telduskipan til føroysku peningastovnarnar. Hetta er ein skipan, sum allar fyritøkur og stovnar, yvir eina ávísa stødd, kunnu hava fyrimun av**

Á øllum økjum í vinnulívinum herðist kappingin og samstundis herðast krøvini til leiðslu og starvsfólk. Skulu starvsfólk lúka tey krøv, sum í dag verða sett til eina nýmótans fyritøku og til kundarøktina, krevst eisini støðug, nágreinilig og áhaldandi kunning. Og tað er her at eitt telduforrit, sum eitur Business Objects kemur inn í myndina.

Business Objects er eitt tað fremsta forritið í heiminum innan Business Intelligence. Business Intellegence er felags hugtak fyri amboð, ið hjálpir fyritøkum at savna, analysera og gangnýta dáta til tess at taka vælgrundaðar avgerðir.

Tað er KT-fyritøkan Skyrr, sum umboðar Business Objects bæði í Føroyum og í Íslandi.

Skyrr hevur ikki verið so sjónligt á føroyska marknaðinum higartil, men tað kann skjótt broytast.

Fyrsta stigið er longu tikið, tí nú hevur fyritøkan tikið upp samstarv við føroysku KT-fyritøkuna, Elektron um eina nýggja telduskipan til føroysku peningastovnarnar.

– Tað eru nógvir veitarar á hesum øki, men tá ið føroysku peningastovnarnir skuldu hava eina nýggja skipan, gjørdu vit eina meting saman við peningastovnunum, fyri at vita, hvør skipan kundi tæna okkum best samanlagt, sigur Fróði Hansen á Elektron, sum stendur á odda fyri hesi verkætlan.

Hann sigur, at Business Objects varð valt tí tað er so nógv útbreitt um allan heim og m.a. gera nógvir peningastovnar nýtslu av tí. Samstundis tað ikki er tøkniliga heft av nøkrum av teimum heilt stóru KT-veitarunum.

Fróði Hansen sigur, at endamálið hjá peningastovnunum við at útvega sær hesa skipanina, er at fáa gagnnýtt upplýsingar, soleiðis at ein breiðari skari av starvsfólkinum í peningastovninum – á ein einfaldan, lættan og smidligan hátt – hevur betri grundalag at veita góða tænastu og at taka skjótar vælgrundaðar avgerðir á.

Fróði Hansen sigur, at samstarvið við Skyrr hevur virkað væl og hann kann saktans ímynda sær, at samstarvið fer at halda fram, eftir at hendan verkætlanin er liðug.

–Tá ið hendan verkætlanin hjá peningastovunum er liðug, er ætlanin at fara víðari. Vit hava longu staðfest áhuga frá øðrum fyritøkum, tí hetta er ikki bara ein skipan, sum kann brúkast í peningastovunum men flest allar fyritøkur og stovnar kunnu fáa gagn av hesi skipan, eisini lutfalsliga lítlar fyritøkur, sigur Fróði Hansen.

## FAKTA

**Stutt um Business Objects:**

- Business Objects er ein heimsumfatandi KT- fyritøka, sum ger "business intelligence" telduforrit og fyritøkan hevur yvir 35.000 viðskiftafólk í yvir 80 londum, umframt eitt netverk við yvir 3.000 samstarvsfeløgum og umboðum.
- Viðskiftafólkini røkka frá smáum fyritøkum til stórar altjóða fyritøkur í øllum vinnugreinum

HEXA
föt fyrir alla
TOTAL SOLUTION FOR WORKING PEOPLE

Workwear | Personal Safety Equipment | Corporate Fashion Wear





Uniforms | Profile Wear | Special Production

www.hexa.is
SERVICE - COMFORT - QUALITY
tel. nr. 354-414-8400